


*Higartil hevur tað bara gingið ein veg hjá The Dreams og tað er uppeftir, og við nýggju fløguni vónar bólkurin at røkka út um danska kongaríkið við sínum tónleiki*

*Myndir: Rólant Waag Dam*

# The Dreams í 13 londum

**Mánadagin kemur nýggjasta fløgan hjá The Dreams, Revolt, í føroysku og donsku handlarnar. Í næstum kemur fløgan eisini út í 13 øðrum londum, og føroyski bólkurin ætlar at enska fløga teirra skal vera næsta fetið út í heim. Sosialurin hevur vitjað The Dreams í venjingarhølum teirra í Vanløse í Danmark**

SAMRØÐA
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Teir syngja á enskum. Tónarnir eru broyttir nakað. Okkurt lag hevur enn tá gittarsolo'ir. Nógv er broytt síðani The Dreams sungu Sasa sa, sa í ítróttarhallum kring Føroyar fyri nøkrum árum síðani.

Í gjárkvøldið vandu Hans Edward, Eirikur, Corfitz og Heini teir sangirnar, sum teir hava arbeitt við seinasta hálvaannað árið. Hetta gjørdu teir í einum myrkum og køldum venjingarhølum í Vanløse í Danmark. Aftaná venjingina pakkaðu teir ljóðførini niður, tí í dag byrjar konsertferð teirra kring Danmark.

– Vit spæla mest fríggjakvøld og leygarkvøld. Hetta er nakað, vit kunnu avgera sjálvir, nú vit eru vorðnir stórir í Danmark, greiða teir frá.

Tað er annars púra vanligt, at bólkar spæla konsertir mitt í viku, men við fløguni Den nye by, sum bólkurin lat av hondum fyri tveimum árum síðani, hevur The Dreams av sonnum markerað seg sum ein av heilt stóru bólkunum í Danmark.

Teir fóru frá at liggja nummar eitt á 15 teimum við løgum av fyrstu fløguni Tazy, og sendandi

## FAKTA

**Mánadagin kemur fløgan Revolt í førosku og donsku handlarnar. Hetta er fjórða fløgan hjá The Dreams. Fyrsta fløgan Tazy kom út í 2006. Næsta fløgan Den nye by í 2008 og í 2009 gav bólkurin út útgávuna Den nye by 09 – Sakin live.**

**Skráin hjá The Dreams næstu dagarnar er tann, at teir spæla í Albertslund í kvøld. Fríggjakvøldið spæla teir í Aalborg, leygarkvøldið í Lyngby og mánadagin í Keypmannahavn, men eisini eftir hetta eru hópin av konsertum á skránni.**

**Teir fýra, sum manna bólkin eru Hans Edward Andreasen, forsangari og gittar, Eirikur Gilstón Corfitz Andersen, bass og kós, Heini Gilstón Corfitz Andersen, gittar og kór, Heini Mortensen, trummur.**



*Chief One og Hans Edward fáa tað seinasta upp á pláss við settlistanum, áðrenn konsertferðin hjá The Dreams byrjar*
*Myndir: Rólant Waag Dam*